HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

13. oktober 2016
Mál: 16/01168-3
Viðgjørt: KHP

# Uppskot til kunngerð um barlastarvatn til hoyringar

Hoyringsfreistin er ásett til mánadagin **14. november 2016**.

**Sáttmálin um barlastarvatn fær altjóða gildi 8. sept. 2017**
Sáttmálin um barlastarvatn, eisini nevndur *Ballast Water Management Convention*, er ein heimsfevnandi sáttmáli undir sjóvinnufelagsskapinum IMO, sum Danmark staðfesti í 2012 og Føroyar í 2013. Sáttmálin fær altjóða gildi 8. sept. 2017. Hetta merkir, at neyðugt er hjá Føroyum at implementera reglurnar í sáttmálanum í føroyska lógarverkið, so at skip undir føroyskum flaggi ikki vera fyri mismuni, tá hesi koma í fremmanda havn og fyri at tryggja, at vit kunnu handhevja reglurnar mótvegis skipum, sum koma í føroyska havn.

Sáttmálin byggir í stóran mun á lívfrøðilig fyrilit og fyrilit fyri lívfrøðiliga margfeldinum í sjónum, áum og vøtnum, har skip sigla. Endamálið við sáttmálanum er at fyribyrgja spjaðing av fremmandum djóra- og plantusløgum og sjúkuelvandi verum, sum kunnu verða førd úr einum havøki og í annað við barlastarvatninum. Vísindin hevur staðfest, at spjaðing av fremmandum ella sjúkuelvandi djóra- og plantusløgum kann ávirka ella skeikla vistskipanina og annars hótta lívfrøðiliga margfeldið runt um í heiminum.

**Reglurnar í uppskotinum**
Reglurnar raka í stuttum skip, sum hava brúk fyri at skifta barlastarvatn í einum øðrum havøki, enn har skipini upprunaliga hava tikið barlastarvatn inn. Skip, sum t.d. hava tikið barlastarvatn inn úr einum øki uttanfyri føroyska 200 fjórðinga markið, kunnu ikki tøma barlastarvatnið í einari føroyskari havn, uttan at fylgja reglunum í hjálagda kunngerða-uppskoti. Heldur ikki kunnu skip tøma barlastarvatn, sum er tikið úr føroyska økinum út í fremmanda havn, uttan at lúka krøvini í sáttmálanum. Reglurnar eru tó ikki galdandi fyri skip, sum bert sigla og virka í føroyskum sjógvi.

Roknað verður við, at tað fara at ganga upp til 6 ár, áðrenn øll skip lúka treytirnar í sáttmálanum. Seinasta freist at lúka treytirnar er til fyrstu endurnýggingina av IOPP (International Oil Prevention Pollution) próvnum aftaná, at sáttmálin er komin í gildi 8. sept. 2017. Hetta fyri at áseta ein so eintýðugan og rímiligan skiftidag, sum gjørligt.

**Tvíbýtt myndugleikaøki**
Tað eru ávikavist Umhvørvisstovan og Sjóvinnustýrið, sum fara at umsita regluverkið og krøvini til handfaring og viðgerð av barlastarvatni. Umhvørvisligu krøvini hava heimild í lógini um verju av havumhvørvinum, meðan krøvini um sertifikat, føring av

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo

barlastvatnsjournal, trygdartøknilig krøv í.s.v. ísetan og brúk av reinsiskipanum o.t., eru fevnd av krøvum frá Sjóvinnustýrinum.

Heitt verður á hoyringspartarnar um at lata **Heilsu- og innlendismálaráðnum**, t.e. himr@himr.fo møguligar viðmerkingar til hjálagda uppskot í seinasta lagi **14. nov. 2016**. Hoyringspartarnir eru eisini vælkomnir at boða frá, um ongar viðmerkingar eru til uppskotið.

Kunngerðauppskotið liggur eisini tøkt á heimasíðuni www.himr.fo

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri